UTTAN ÚR HEIMI

## Tað gongur rætta vegin

Í einari meting av búskapargongdini í teimum skandinavisku londunum sigur Danske Bank, at tað gongur tann rætta vegin í Danmark, Svøríki og Noregi, men at framburðurin hevur ikki havt stórvegis ávirkan á arbeiðsloysið í teimum trimum londunum.

Um danska búskapin saigur Danske Bank, at bruttotjóðarframleiðslan fer at veksa 2,4 prosent í ár og 2,3 prosent næsta ár. Samstundis roknar bankin við, at 20.000 danir fáa arbeiði afturat í hesum árinum. Svenski vøksturin er uppaftur størri enn tann danski. Danske Bank væntar, at bruttutjóðarframleiðslan í Svøríki verður 3,0 prosent í ár og 2,5 prosent næsta ár. Men hinvegin veksur arbeiðsloysið í Svøríki, soleiðis at tað er 6,0 prosent nú ella eitt prosentstig meiri enn fyri einum ári síðani.

Um tann norska búskapin sigur Danske Bank, at har gongur tað eisini tann rætta vegin, men at heldur ikki har hevur framburðurin havt stórvegis ávirkan á arbeiðsloysið. Ein orsøk kann vera, sigur bankin, at yvirkapasitetur er í fleiri norskum vinnugreinum.

## Kennir seg hótta

Iranska kvinnan Shirin Ebadi, sum fekk Nobel-friðarheiðursløntina í fjør fyri arbeiði sítt fyri mannarættindum í Iran, sigur við tíðindastovuna Reuters, at hon kennir seg ikki trygga.

Í samrøðuni sigur hon, at onkur hevur brotið jarnportrið, sum er uttan fyri hús hennara, og tað tulkar hon sum eina ávaring frá teimum, sum eru ímóti tí, sum hon tekst við. Ebadi, sum er útbúgvin løgfrøðingur, sigur, at hon hevur altíð kent seg hótta, men at hon fer ikki at gevast við arbeiðinum at útvega teimum muslimsku kvinnunum størri rættindi.

Umframt sítt arbeiði fyri mannarættindum arbeiðir Shirin Ebadi sum sakførari. Í løtuni umboðar hon tey avvarðandi hjá kanadisku tíðindakvinnuni Zahra Kazemi, sum doyði, meðan hon sat í varðhaldi hjá iransku løgregluni í fjør. Kazami bleiv tikin, tí hon hevði tikið eina mynd av einum iranskum fongsli.

## Stríðast um havnapláss

Tað er vorðið so trongligt í havnini í Bergen, at har er ikki nóg mikið av plássi til teirra, sum fegin vilja vera har.

Teir, sum rógva út, vilja fegnir sleppa at leggja at, so teir kunnu selja áhugaðum fiskin, men trupulleikin er, at tað er ikki pláss til tess, skrivar Bergens Tidende. Men hesa umberingina hóvar útróðrarmonnunum lítið. Teir halda tað vera nógv fyri, at havnarmyndugleikarnir sýta teimum atløgupláss í havnini, meðan stuttleikabátar í stórum tali sleppa at liggja við bryggju.

Teir kommunalu myndugleikarnir siga, at teir noyðast at hugsa um fiskahandlarnar á torginum í býnum, sum sjálvandi ikki vilja hava kapping frá útróðrarmonnunum. Harafturat má býráðið hugsa um tær nýggju reglurnar um yvirgang. Sambært Bergens Tidende heldur kommunan, at tað kann vera óheppið at fáa fleiri fólk oman á bryggjuna, tí tað kann vera ein hóttan ímóti trygdini, sum tikið verður til.

## Seinur postur

Ein kvinna í suðurtýska landslutinum Saarland fekk nú um dagarnar eitt postkort frá beiggja sínum.

Í sjálvum sær er einki løgið í hesum, men søgan er løgin kortini, tí postkortið varð sent úr París fyri 42 árum síðani. Tað eru umleið 300 kilometrar úr París til Saarland, og bæði franska og týska postverkið ásanna, at hóast posturin ikki altíð gongur so skjótt, so hevur hetta postkortið havt dekan ov langa tíð um at koma fram. Sambært blaðnum Saarbrücker Zeitung skrivaði beiggin, at hann vónaði at frætta aftur frá systrini skjótt, men hann slapp at bíða leingi.

Franska postverkið hevur eina frágreiðing um, hví postkortið var so nógv seinkað. Tað vísti seg, at frímerkið, sum beiggin hevði sett á kortið, var ikki franskt, men írskt.

# Samkynd geva Bush og Cheney trupulleikar



George W. Bush, forseti, góðtekur ikki, at samkynd ganga saman í hjúnalag. Hann vil hava tað bannað í sjálvari grundlógini



Dick Cheney, varaforseti, eigur eina dóttur, sum er samkynd. Hann sigur, at tey samkyndu skulu hava somu rættindi sum onnur

**George W. Bush, forseti, vil ikki hoyra talan um samkynd hjúnarløg. Dick Cheney, varaforseti, roynir at verja sína samkyndu dóttur**

USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Kjakið um amkynd hjúnarløg hevur fingið rættiliga stóra rúmd í orðaskiftinum upp undir amerikanska forsetavalið í heyst, men samstundis er tað vorðið alt meiri sjónligt, at republikanararnir hava ein trupulleika í hesum málinum.

George W. Bush, forseti, er eirindaleysur, tá tað snýr sum um at viðurkenna samkynd hjúnarløg. Tað vil hann ikki hoyra talan um, og varaforseti hansara, Dick Cheney, hevur tikið undir við honum. Hinvegin hevur amerikanski almenningurin leingið verið vitandi um, at tann 34 ára gamla Mary Cheney, sum er dóttur varaforsetan, og sum arbeiðir hjá republikanska flokkinum, er samkynd.

Á einum veljarafundi í statinum Iowa nú um dagarnar bleiv Dick Chenet spurdur beinleiðis, hvørji rættindi tey samkyndu eiga at hava eftir hansara tykki. Hann svaraði, at øll skulu hava sama frælsi og somu rættindi til at skipa seg, sum tey vilja.

New York Times skrivar, at ósemjan um rættindini hjá samkyndum hevur elvt til split í republikanska flokkinum, og at spurningurin uttan iva verður eitt av stríðsevnunum, tá republikanararnir fara at hava landsfund í New York í næstu viku.

Samstundis hevur ein felagsskapur við 12.000 samkyndum republikanarum boðað frá, at hann vil hava forsetan at broyta áskoðan. Felagsskapurin vil vera við, at ein umleið millión samkyndir amerikanarar atkvøddu fyri Bush fyri fýra árum síðani.

# Klokkan sigur hvat kríggið í Irak kostar

**Amerikanararnir bera orð fyri at hava gott hugflog. Nú hava teir hongt eina ovurstóra klokku á Times Square í New York, og har kunnu fólk fylgja við, hvussu nógv kríggið í Irak kostar USA**

USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tá klokkan í Times Square bleiv sett í gongd fyrradagin, vísti hon, at tá hevði kríggið í Irak kostað amerikanarunum 134,5 milliardir dollarar.

Men pinnarnir standa ikki í stað, tí felagsskapurin, sum eigur klokkuna, hevur roknað út, at kríggið kostar amerikonsku skattgjaldarunum umleið 170 milliónir dollarar um samdøgrið. Tí er klokkan gjørd soleiðis, at fyri hvønn minutt leggur hon einar 700.000 dollarar afturat kostnaðinum.

Tað er felagsskapurin Project Billboard, sum er komin við hugskotinum um klokkuna í Times Square, og tað er ikki av tilvild, at hon er komin at hanga har bara fáar dagar undan landsfundinum hjá republikanska flokkinum.

Ein líknandi klokka hevur hingið í Times Square fyrr. Hon vísti hallið á amerikonsku fíggjarlógini. Hevði klokkan hingið har enn, høvdu tølini verið størri nú enn nakrantíð fyrr, tí herfyri kunngjørdu Hvítu Húsini, at hallið á verandi fíggjarlóg verður um 500 milliardir dollarar. Tá segði altjóða gjaldoyragrunnurin IMF, at hallið er ein hóttan ímóti øllum heimsbúskapinum, skrivar Reuters.



# Føroyskur rockur ger innrás í Keypmannahavn

**Leygarkvøldið skipa Norðurlandahúsið og Vega í Keypmannahavn fyri fyrsta Atlantic Music Event tiltakinum, har Eivør Pálsdóttir, Bill Bourne, Gestir og Makrel spæla. Tiltakið verður í Vega**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



*Makrel verður millum bólkarnar, sum l eygarkvøldið fara at spæla á Vega*

Vega í Keypmannahvn verður karmur um føroyskan tónleik um vikuskiftið. Norðurlandahúsið og Vega skipa fyri tiltakinum Atlantic Music Event, sum ber heitið eftir Atlantic Airways, sum er høvuðsstuðul, nú føroyskur rockur ger innrás í Keypmannahavn.

Eisini Dansk Musikerforbund og Norðoya Sparikassi stuðla og millum aðrar møguligir stuðlar er Mentunargrunnurin.

### Eivør, Gestir og Makrel

Talan verður um búgvið borð, tá borðreitt verður við føroyskum berstubitum. Eivør og Gestir sessast við borðið, har eisini Makrel er at fáa. Umframt Eivør verður Bill Bourne við hennara lið.

Eivør, Bill, Gestir og Makrel skulu umboða føroyska tónleikin á Vega. Dansk Musikerforbund fylgir tiltakinum og eisini blaðið tónleikablaðið Musikeren. Somuleiðis verður væntað, at eisini aðrir tónleikahugaðir miðlar taka táttin upp og fara at ummæla.

Lýst verður í hesum døgum við tiltakinum, har Eivør prýðir plakatina við stórari mynd og Gestir og Makrel síggjast á smærri myndum. Prísurin fyri konsertina leygarkvøldið 28. august er bert 100 krónur.

Á heimasíðu Norðurlandahúsins kann lesast nærri um tiltakið og har síggjast eisini góðu ummælini, sum hesir tónleikarar hava fingið úti og heima.

# Ansingartørvurin næstan horvin



*Týsmorgunin varð barnagarðurin undir Brúnni í Havn reistur*
*Mynd. Jens K. Vang*

Tórshavnar kommuna nærkast nú máli sínum um, at barnaansingartørvurin verður nøktaður. Tveir nýggir barnagarðar eru nú reistir, sum hvør fara at hýsa um 60 børnum. Hetta fer so at merkja, sum støðan er í dag, at tá báðir teir nýggju stovnarnir eru tiknir í nýtslu, verða ongi børn á bíðilistanum hjá Tórshavnar kommunu. Tað var eisini málið hjá býráðnum, at við árslok 2005 skuldu ongi børn standa á bíðilista til ansingarpláss.

Týsmorgunin varð nýggi barnagarðurin undir Brúnni reistur, og verður hann sum skilst tikin í nýtslu seinni í ár.

**- sae –**



NORÐURLANDAHÚSIÐ **TILTØK AUGUST 2004**

**SKRÁIN VIKA 33-34**

**Sunnudagur 29. august**
**Kl. 09.00** **20. Norðurlendska Rúsevnisráðstevnan,**
Fyrireikari er Fyribyrgingarráðið.

**Mánadagur 30. august**
**Kl. 09.00** **Norðurlendsk Rúsevnisráðstevna,** framhald

**Týsdagur 31. august**
**Kl. 09.00** **Norðurlendsk Rúsevnisráðstevna,** sísti dagur!

Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-18.00
og sunnudagar kl. 14.00-18.00

NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM
Telefon nr. 317900 · Telefax nr. 319790
www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo

Føroya Keypssamtøka í Hoyvík

**Keypssamtøkan**

***søkir eftir fólki til grønmetis- og blómudeildina***

Søkt verður eftir fólki til grønmetisdeildina / blómudeildina at byrja 1. oktober ella eftir nærri avtalu

**Vit vænta av tær**
..... at tú hevur hollan kunnleika til frukt, grønmeti og blómur frá núverandi ella fyrrverandi arbeiði
..... at tú hevur eyga fyri dygd og búskapi
..... at tú ert kreativur og virkin og kann vísa fram eina fyrsta floks deild, sum er tann besta í landinum

**Vit kunnu bjóða tær**
..... eitt sjálvstøðugt og menn-andi arbeiði
..... eitt gott arbeiðsumhvørvi

**Løn**: Sambært avtalu

Áhugað kunnu venda sær til Bent Lundsgaard, deildarleiðara, tel 214016.
Skrivlig umsókn skal sendast til FK Hoyvík, boks 349, 188 Hoyvík, innan 4. september

**Keypssamtøkan í Hoyvík**